Heðin Mortensen,
løgtingsmaður

Nr. 14/2020

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um møguliga sølu av almenna ognarlutinum í BankNordik, settur landsstýrismanninum við fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvørjar broytingar heldur landsstýrismaðurin, at tað fer tað at hava við sær fyri umstøðurnar í BankNordik, burtursæð frá teimum fíggjarligu, um almenni ognarluturin í bankanum verður seldur?
2. Hvørjar broytingar heldur landsstýrismaðurin, at tað fer tað at hava við sær fyri starvsfólkini í BankNordik, um almenni ognarluturin verður seldur?

Viðmerkingar:
Samgongan hevur ført fram, at tað eru ætlanir um at selja almenna ognarlutin í BankNordik. Í løtuni er landið minnilutaeigari í BankNordik, men hóast hetta hevur avmarkaða ávirkan við sær, kann landið virka sum blokerandi minniluti, um ætlanir eru við felagnum, sum ikki hóva eigarunum, sum í hesum førinum er Føroya fólk.
Um almenni ognarluturin í BankNordik verður seldur, kann eitt hugsað dømi vera, at útlendskir ognarar keypa bankan, og at bankin í Føroyum verður ein deild/ir undir útlendskum banka. Hetta hevði uttan iva havt ávirkan á fleiri viðurskifti í bankanum, sum er millum størstu arbeiðspláss í landinum. Fyri at fáa greiðu á møguligum avleiðingum fyri starvsfólkini, verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 9. september 2020

Heðin Mortensen